# Stór kapitalhækkan í London

**8. mai gjøgnumførir Føroya Kolvetni kapitalhækkan á £ 25 mió. Peningurin skal nýtast til 8 boringar komandi tvey árini**

VIRÐISBRØV
*Jákup Mørk*

Í tíðindaskrivi staðfestir føroyska oljufelagið, at kapitalhækkanin er beinleiðis avleiðing av, at felagið komandi tvey árini fer at økja munandi um virksemið.

Síðani stovnanina hevur Faroe Petroleum fyri tað nógva arbeitt við at keypa sær atgongd í fleiri lisensir, men nú verður talan um beinleiðis boringar. Samhært ætlan, so verður Føroya Kolvetni partur av átta boringum komandi 18 til 24 mánaðirnar, og tær báðar fyrstu av hesum verða gjøgnumførdar longu í ár. Hesi bæði eru North Halibut í Norðsjónum og Brugdan á Føroya-økinum.

Í tíðindaskrivi sigur Graham Stewart, stjóri, at tey eru sera væl nøgd við undirtøkuna, sum kapitalhækkanin hevur havt.

– Hetta vísir álitið, sum marknaðurin hevur á felagnum og løgdu strategi okkara. Eftir kapitalhækkanina er felagið væl fyri at fara undir næsta partin av virkisætlanini, sum er sjálvt boriarbeiðið. Og hartil vilja vit framhaldandi arbeiða við at vaksa um portefølja okkara við leitingarøkjum og við at útbyggja virksemið í Noreg, har felagið fyri stuttum kom ígjøgnum eina sonevndina pre-kvalifikatión.

# IRF hevði 6,5 milliónir krónur í avlopi í fjør

**Fríggjadagin hevði IRF aðalfund, har nevndarformaðurin legði fram ársroknskapin fyri 2005**

ROKNSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samlaðu inntøkurnar vóru uml. 60,2 mió. kr., sum er á leið tað sama sum í 2004.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar vóru uml. 41,8 mió. kr., sum eru 350 t.kr. lægri enn í 2004.

Rentuútreiðslurnar vóru 3 mió. kr. Samlaða skuldin í 2005 minkaði við 6,6 mió kr.

### Rakstrarúrslit

Úrslitið áðrenn avskrivingar gjørdist 18,4 mió. kr., sum er 200 t.kr. hægri enn í 2004. Avskrivingarnar vóru tær somu sum í 2004. Rentuútreiðslurnar vóru uml. 200 t.kr. lægri enn í 2004.

Úrslitið frá vanliga rakstrinum gjørdist 6,5 mió. kr., sum eru 500 t. kr. hægri enn í 2004.

### Fíggjarstøðan

Langfreistaða skuldin er 66,1 mió. kr., meðan stuttfreistaða skuldin er 10,4 mió. kr. Eginognin er hækkað við rakstrarúrslitinum og er nú 34,9 mió. kr. Fíggjarstøðan javnvigar við 112,7 mió. kr.

# Bøta bátaumstøður í Vestmanna

**Í Vestmanna fara tey at bøta umstøðurnar hjá bátum og campingvognum til Bátastevnuna, sum verður 20. mai**

BÁTASTEVNA

Leygardagin 20. mai verður árliga Bátastevnan í Vestmanna, har bátar og smærri før úr øllum Føroyum seta hvørjum øðrum stevnu í Vestmanna. Hetta er fimta árið á rað, at bátastevnan verður hildin í Vestmanna í mai mánaði, og tiltakið hevur verið ógvuliga væl umtókt. Undanfarin ár hava upp í 200 bátar úr øllum landinum sett stevnu í Vestmanna.

Av tí at Bátastevnan í Vestmanna er so væl umtókt, og nógvir bátar vitja, hava fyrireikarnir gjørt av at betra um atløguviðurskiftini. Vestmanna Ítróttarfelag hevur fingið til vega nakrar bátabrúgvar til endamálið, og ætlanin er at leggja bátabrúgvarnar út í bátahylin, soleiðis at mongu bátarnir koma at liggja trygt og væl. Arbeitt verður í løtuni við at gera bátabrúgvarnar klárar.

Eisini verða viðurskiftini hjá teimum nógvu vitjandi campingvognunum betrað. Campingvognarnir fáa avlagt eitt øki við ferjuleguna Inni á Fjørð, og har verður møguligt at fáa vatn og el, umframt at sanitetsviðurskiftini verða góð.

Vestmanna Ítróttarfelag væntar, eins og undanfarin ár, at tiltakið fær minst líka góða undirtøku í ár og bjóðar hervið øllum áhugaðum vælkomnum á Bátastevnu 2006 í Vestmanna, leygardagin 20. mai 2006.


## Fólk til iTec!

**Vit eftirlýsa einum dugnaligum KT-sølufólki.**

Til søludeild okkara søkja vit eftir einum dugnaligum sølufólki, ið hevur eina holla og breiða vitan um KT-vørur og um tørvin hjá stórum sum smáum kundum.

iTec er ein KT-fyritøka, ið leggur seg eftir at selja dygdarvørur og at veita kundunum hesar saman við góðum prísum og góðari og álítandi tænastu.

Vit vænta okkum, at tú hevur eina hóskiliga útbúgving innan handil/sølu og/ella KT. Royndir við at selja KT-vørur og tænastur eru ein fyrimunur.

**Vilt tú gerast partur av einum vælvirkandi KT-verkstaði?**

ITec hevur eitt vælvirkandi verkstað, har vit umvæla flest øll sløg av teldum, printarum og øðrum KT-tólum. Vit hava drúgvar royndir og góðar førleikar til hetta slagið av uppgávum, og hava brúk fyri meiri fólki at røkja uppgávur okkara.

Vit søkja eftir einum álítandi og dugnaligum fólki við hóskandi KT-tøkniligari útbúgving. Royndir frá umvæling av KT-útbúnaði er ein fyrimunur men ikki eitt krav.

Vit kunnu bjóða tí rætta fólkinum eitt avbjóðandi og spennandi starv í eini væl riknari og vaksandi fyritøku.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 28. apríl. Hevur tú spurningar, so ring á telefon 35 60 00 og spyr eftir Leivi.

iTec
KT-ansni

SISERO 351800

iTec er ein av smærru teldufyritøkunum í Føroyum, men vit smæðast ikki at lova eina góða og álítandi tænastu. iTec veitir tænastur ætlaðar virkjum, stovnum, feløgum, skúlum og einstaklingum. Umframt at veita tænastur á telduøkinum selur iTec eisini teldu- og prentútgerð. M.a. umboðar iTec dygdarmerkini Acer og Lexmark.


